# – Okkum dámar væl á Sosialinum

**Seinastu tvær vikurnar hevur Sosialurin havt tríggjar næmingar í starvsvenjing, tvær úr 10. flokki í Fuglafirði og ein úr 10. flokki á Tvøroyri**



*Signar á Brúnni, lærari í Fuglafirði, vitjaði í vikuni næmingarnar úr Fuglafjarðar Skúla í Miðlahúsinum í Vágsbotni, sum eru í starvsvening á Sosialinum*
*Mynd: Jan Müller*

STARVSVENJING
*Katrina Eyðunsdóttir Hansen/ Mariann Mikkjalsdóttir/ Elsa Maria Højgaard Hansen*

Tvær tær seinastu vikurnar, hava vit tríggjar verið í starvsvenjing her á Sosialinum. Hetta hava verið tvær ógvuliga fjølbroyttar og spennandi vikur. Vit hava verið nógva staðni við starvsfólkunum her. Millum annað vóru vit ein dagin saman við Snorra Brend og Jens Kristian Vang á Kalsoynni og høvdu samrøður við ymisk fólk. Sjálvar hava vit havt samrøður við fólk her í Tórshavn, aðrir praktikantar frá Suður- og Eysturoynni og við Carpark North, sum spældu í mentanarhúsinum fyri stuttum.

Ein annan dag vóru vit aftur úti við myndamanninum Jens Kristian Vang. Tá vóru vit á fundi um DJ-lán á Gourmet, og eftir tað fóru vit til listaframsýningina hjá Lisbeth Mortensen í Smiðjuni í Lítluvík o.m.a.

Á Sosialinum arbeiða umleið 25-30 arbeiðsfólk.

Uppgávurnar millum blaðfólkini eru býttar upp á ymsan hátt. Skrivað verður um fólk og fæ, tað almenna, vinnu, samferðslu, arbeiðsmál, kristnilív, ìtrott, bilar, nøvn í vikuni, heilsanir, bøkur, leikir, list, tónleik og mangt annað.

Í apríl mánað flutti Sosialurin av Argjum í Vágsbotn. Nýggju hølini eru snotulig og vøkur við gomlum trægólvum og eru innrættað við glasveggum og glashurðum.

Tað er ógvuliga týdningarmikið at starvspláss gera nógv burtur úr praktikantum, og at man gevur teimum tær røttu uppgávurnar og ikki »lortaarbeiði«.

Um næmingarnir ikki sleppa at gera tað stóra, so missa teir sum oftast hugin til at arbeiða. Starvsvenjing er ikki bara tvætl, og tað eiga allir næmingar at vita. So tað er av alstórum týdningi, at man sær til at næmingarnir ikki fáa ov leysar teymar, so at teir kunnu gera ella møta upp, sum teir sjálvir vilja. Tað er umráðandi at fáa praktikantin at trívast og at kenna seg væl.

Og okkara hugsan er, at hetta hevur Sosialurin megnað væl!



*Elsa Maria Højgaard Hansen úr Norðragøtu, Mariann Mikkjalsdóttir úr Trongisvági og Katrina Eyðunsdóttir Hansen úr Norðragøtu hava verið í starvsvenjing á Sosialinum seinastu tvær vikurnar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, um kvøldið nakað minni vindur av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útnyrðingi, um kvøldið minni vindur av vestri. Ælingur fyrrapartin, annars yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og og útsynningi og ælingur, seinni regn. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, mánakvøldið minni vindur. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 7 og 11 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -1 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 15 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 25 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 20 |
| New York | 22 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 27 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | -- |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22s |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 992 hPa. við Hetland fer eystureftir. Eitt annað lágtryst, 977 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjanáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer í landnyrðing og hevur nógvan vind við sær á okkara leiðum – fyrst av útsynningi, seinni av útnyrðingi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/9 kl. 06[00]– 29/9. 06[00]. Hitin í gjár: 6,3°
Minsti hiti máldur í sept.: - 0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 28/9 kl. 06[00]– 29/9 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 186,7 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

25. september Seinna kvarter
28. september Mánin longst frá jørðini
3. oktober Tendring

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. Sept | 05.30 | 17.49 | 04.30 | 16.49 | 04.45 | 17.04 | 07.30 | 19.49 | 08.30 | 20.49 | 03.45 | 16.04 | 02.45 | 15.04 | 05.45 | 18.04 | 06.45 | 19.04 | 05.15 | 17.34 | 06.30 | 18.49 |
| 1. okt. | 06.06 | 18.24 | 05.06 | 17.24 | 05.21 | 17.39 | 08.06 | 20.24 | 09.06 | 21.24 | 04.21 | 16.39 | 03.21 | 15.39 | 06.21 | 18.39 | 07.21 | 19.39 | 05.51 | 18.09 | 07.06 | 19.24 |
| 2. Okt. | 06.41 | 18.58 | 05.41 | 17.58 | 05.56 | 18.13 | 08.41 | 20.58 | 09.41 | 21.58 | 04.56 | 17.13 | 03.56 | 16.13 | 06.56 | 19.13 | 07.56 | 20.13 | 06.26 | 18.43 | 07.41 | 19.58 |
| 3. Okt. | 07.16 | 19.34 | 06.16 | 18.34 | 06.31 | 18.49 | 09.16 | 21.34 | 10.16 | 22.34 | 05.31 | 17.49 | 04.31 | 16.49 | 07.31 | 19.49 | 08.31 | 20.49 | 07.01 | 19.19 | 08.16 | 20.34 |
| 4. Okt. | 07.52 | 20.10 | 06.52 | 19.10 | 07.07 | 19.25 | 09.52 | 22.10 | 10.52 | 23.10 | 06.07 | 18.25 | 05.07 | 17.25 | 08.07 | 20.25 | 09.07 | 21.25 | 07.37 | 19.55 | 08.52 | 21.10 |

5 707265 100050 >